Stríð í Føroya Pedagogfelag:

# Tríggir nevndarlimir tikið seg úr nevndini

**– Vit eru ónøgd við arbeiðsgongdina í felagnum og í nevndini sum heild. Eg eri vald í nevndina av limunum, men kann ikki taka ábyrgd av nøkrum, sum eg ikki kann standa inni fyri, sigur fyrrverandi næstformaðurin í felagnum, Ann-Elisabeth Joensen**

STRÍÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er rumbul í Føroya Pedagogfelag.

Tríggir av fimm nevndarlimum í felagnum hava seinastu vikurnar tikið seg úr nevndini, og millum teirra er næstformaðurin, Ann-Elisabeth Joensen.

Bjørghild í Geil, sum hevur verið kassameistari í felagnum í mong ár, hevur takkað fyri seg, og tað hevur Gitte av Kák eisini gjørt.

Sum skilst, tók Gitte seg úr nevndini longu fyrst í hesum árinum, fyri 2-3 vikum síðan fór Ann-Elisabeth, og í hesi vikuni fór so eisini Bjørghild.

Eftir situr formaðurin, Jarvin F. Hansen, sum varð valdur til formann á seinasta aðalfundi og tann eini nevndarlimurin, sum eftir er av fimm.

Tiltakslimur í nevndini í Føroya Pedagogfelag er Marita Eidesgaard í Oyndarfirði, men sum Sosialurin hevur fingið upplýst, er ivasamt, um hon tekur sæti í nevndini.



*Líkt var til, at samstarvið millum formannin og næstformannin í Føroya Pedagogfelag, Jarvin F. Hansen og Ann-Elisabeth Joensen, fór at ganga væl, eftir at arbeiðsdagurin hjá nýggja formanninum var byrjaður. Men nú er vátt komið í reiðrið, og tríggir av fimm nevndarlimum hava tikið seg úr nevndini*

## Ónøgd við arbeiði

Tað hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa uppspurt, hvat ítøkiliga ónøgdin millum nevndarlimirnar í pedagogfelagnum snýr seg um, men fyrrverandi næstformaðurin, Ann-Elisabeth Joensen, sigur, at málið snýr seg um ónøgd við arbeiðsgongdina – bæði í felagnum sum heild arbeiðsháttin hjá nevndini.

– Eg vil ikki fara út í smálutir um, hvat ónøgdin snýr seg um, og eg ynski ikki alment at seta niður á navngivnar persónar.

Formaðurin í Føroya Pedagogfelag, Jarvin F. Hansen, hevur verið sjúkrameldaður í einar tveir mánaðir, men er nú komin aftur til arbeiðis. Meðan valdi formaðurin hevur verið burtur, hevur Ann-Elisabeth verið virkandi formaður í umleið hálvan annan mánaða.

Spurd, hvussu tað ber til, at nevndarlimir hava sagt sessin frá sær í hesum tíðarskeiði, meðan formaðurin hevur verið so lítið til arbeiðis, sigur hon:

– Ónøgdin við arbeiðsgongdina er ikki eitt mál, sum hevur tikið seg upp beint nú, men hevur verið »leypandi« yvir eina longri tíð. Eg haldi, at formaðurin, Jarvin F. Hansen, hevur havt stundir at fótað sær í felagnum, eftir at hann varð valdur til formann á seinasta aðalfundi.

## Drastisk avgerð

Í stuttum vísir Ann-Elisabeth á, at hon er vald í nevndina í Føroya Pedagogfelag av limum felagsins, og nú ónøgdin við arbeiðsgongdina í felagnum er vorðin so stór, kann hon ikki longur taka ábyrgd av nøkrum, hon ikki sjálv kann standa inni fyri, sum hon tekur til.

– Eg og Bjørghild, sum hevur drúgvar royndir í fakfelagsarbeiði, hava arbeitt væl saman, og vit hava staðið ógvuliga væl saman. Vit eru samdar um tað arbeiði, sum vit halda skal gerast í felagnum, men eru ikki í nóg stóran mun hoyrdar.

Sum Sosialurin skilir, er tað ónøgdin við arbeiðsgongdina í felagnum, sum hevur fingið allar tríggjar at taka seg úr nevndini.

Ann-Elisabeth Joensen sigur, at tað skal nógv til, áðrenn nevndarlimir taka seg úr tí arbeiði, tey á aðalfundi eru vald at gera.

– Hetta er ein drastisk avgerð, sum ikki verður tikin til stuttleikar, men eg føli veruliga, at vit koma ikki víðari, soleiðis sum støðan í felagnum er, sigur hon.

---

Formaðurin í Føroya Pedagogfelag:

# – Eg leggi ikki frá mær sum er

**Jarvin F. Hansen váttar, at limir hava tikið seg úr nevndini í Føroya Pedagogfelag, men annars hevur hann ongar viðmerkingar til ítøkiliga málið. – Eg fari fyrst at kunna limir felagsins um støðuna, áðrenn eg vil siga nakað alment um viðurskiftini, sigur hann**



*– Eg taki tað róligt fram til aðalfundin sum verður um hálvan annan mánaða. Sum er, leggi eg ikki frá mær, men annars havi eg ongar viðmerkingar til framtíð mína sum formaður í felagnum, sigur Jarvin F. Hansen, sum varð valdur til formann í Føroya Pedagogfelag á seinasta aðalfundi*

STRÍÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir at hava verið sjúkrameldaður í einar tveir mánaðir, er formaðurin í Føroya Pedagogfelag, Jarvin F. Hansen, komin aftur til arbeiðis.

Aðalfundur felagsins hevur verið útsettur vegna sjúku, men sambært formanninum verður fundurin lýstur at verða, 30. apríl í Læraskúlahøllini.

Tað var á væl møtta aðalfundinum í fjør, at Jarvin varð valdur til nýggjan formann í felagnum í kapping við Ann-Elisabeth. Eini 450 fólk vóru á fundi, og er hetta rættiliga góð uppmøting á aðalfundi felagsins. Vanliga eru eini 200-300 fólk á aðalfundi í pedagogfelagnum, men tá ið kapping er millum valevni, er áhugin vanliga nógv størri.

## Tekur tað róligt

Jarvin F. Hansen váttar, at mannfall seinastu vikurnar hevur verið í nevndini í Føroya Pedagogfelag, men hann vil einki siga um orsøkina, og hann vil heldur einki siga um, hvørjir fyrrverandi nevndarlimirnir eru.

– Nú er hetta málið so nýtt, og tí fari eg at kunna limir felagsins um støðuna, áðrenn eg fari at kunna almenningin um viðurskiftini í felagnum, sigur formaðurin.

Jarvin sigur, at nevndin í felagnum eftir hansara tykki hevur samstarvað rímiliga væl – og hevur drigið somu línu í fleiri málum.

– Men eg noyðist at ásanna, at nú hava fólk tikið seg úr nevndini, sum ikki verður fullmannað aftur fyrr enn á aðalfundi felagsins.

Hann vísir á, at felagið hevur ein tiltakslim.

– Eg eri júst komin aftur til arbeiðis, og eg ætli mær at taka tað róligt, til aðalfundurin verður, sigur hann.

## Ikki frá sum er

Jarvin F. Hansen sigur, at hann er valdur til formann í Føroya Pedagogfelag fyri tvey ár, og tískil stendur hann ikki fyri vali á komandi aðalfundi.

Spurdur, um tað kann hugsast, at hann tekur avleiðingarnar av støðuni og fer at leggja frá sær, sigur hann:

– Sum er, leggi eg ikki frá mær, men annars havi eg ongar viðmerkingar til framtíð mína sum formaður í felagnum, sigur hann.

Sambært skipanini, standa tveir nevndarlimir fyri vali á komandi aðalfundi.

Jarvin sigur, at felagið nú fer undir at fyrireika aðalfundin, sum verður í Læraraskúlahøllini um hálvan annan mánaða.

– Eg kundi hugsað mær, at aðalfundurin eisini var meira fakligur, t.d. við eini ráðstevnu, men stundir verða helst ikki at fyrireika hetta til aðalfundin komandi, sigur formaðurin, Jarvin F. Hansen.

Føroya Pedagogfelag er eitt lutfalsliga stórt felag við fleiri enn 1500 limum, harav nógv tann størsti parturin er kvinnur.